


# Sjónligt Piratförlag

Básurin hjá Piratförlaget, ið gevur út bøkurnar eftir Jan Guillou, Lizu Marklund og aðrar kendar svenskar rithøvundar, var tann básurin, ið sást nógv best á allari bókamessuni Bok & bibliotek. Her tosar Jan Guillou um nýggjastu bók sína, *Fienden inom os.*




# Bókanýtt úr Göteborg

Bok & Bibliotek '07

**Omanfyri 100.000 fólk vitjaðu teir 880 framsýnararnar á størstu norðurlendsku bókamessuni, Bok og bibliotek, í Göteborg herfyri**

## Bøkur



Arnbjørn Ó. Dalsgarð
arndal@flb.fo

Ársins útgáva av stóru árligu bóka- og bókasavnsmessuni Bok & bibliotek í Göteborg slerdi øll met í mun til undanfarin ár í tali av vitjandi og framsýnarum. Heili 108.468 fólk vitjaðu messuna dagarnar 27-30. september, og tað eru fleiri enn í 2004, sum annars var metár. Talið av framsýnarum var í ár var 881, og tað eru 31 fleiri enn í 2006, sum átti hetta met. Sostatt er Bok & bibliotek nógv tann størsta bókamessan í Norðurlondum. Síðsta vikuskiftið greiddu vit frá um nakað av tí, sum fór fram á bókamessuni. Og sum lovað tá, viðgera vit her meira av tí, sum fór fram á Bok & bibliotek 2007.



# Lesivinir hittast á alnetinum

**Ger tín egna lesiring, ella skriva eina skaldsøgu saman við lesivinum tínum. Møguleikarnir eru mangir, tá ið lesivinir hittast á heimasíðuni hjá Bokcirklar.se**

Í Svøríki hevur ein bólkur av lesiglaðum fólkum sett á stovn ein lesiring, Bokcirklar, sum heldur til á alnetinum, og sum øll við atgongd til alnetið ókeypis kunnu vera við í. Har ber til at stovna sín egna lesiring, fáa lesivinir, gera sín egna lesikrók, skriva lesidagbók og vera við til at skriva eina skaldsøgu saman við øðrum lesivinum.

Ein av stigtakarunum er Nina Frid, sum dagliga starvast sum bókavørður á einum fólkabókasavni í Nacka í Stokkhólmi. Hon sigur, at Bokcirklar virkar stórt sæð eins og ein vanligur lesiringur, men ein lesiringur á alnetinum gevur eisini møguleikar, sum ikki eru í einum vanligum lesiringi.

- Lesarar kunnu her finna aðrar lesarar við sama lesiáhuga sum ein sjálvur, og ein kann eisini øvugt fáa íblástur frá lesarum, sum lesa heilt aðrar bøkur enn ein sjálvur, sigur Nina Frid.

Á heimasíðuni www.bokcirklar.se síggjast teir lesiringar, sum higartil eru settir á stovn. Har fæst at vita, at mánadagin 29. oktober kl. 20-21.30 fara tey í einum lesiringi at kjatta um bókina ABC eftir donsku Idu Jessen, og fríggjadagin 11. november kl. 21-22.30 verður kjattað um bókina Blonde eftir Joyce Carol Oates, sum snýr seg um Marilyn Monroe.

Spurd um Bokcirklar bara er fyri svenskar lesarar, svarar Nina Frid, at í grundini kunnu øll, sum duga at lesa bøkur á einum norðurlendskum máli vera við, og hon leggur afturat, at tað hevði verið einastandandi, um onkur stovnaði ein norðurlendskan lesiring á Bokcirklar.

Tá ið vit vitjaðu básin hjá Bokcirklar á bókamessuni Bok & bibliotek í Göteborg, høvdu næstan 500 lesarar teknað seg sum limir.




*Oskar Bjursten og Nina Frid eru tvey teirra, ið hava tikið stig til Bokcirklar.se, har lesivini r hittast at kjatta um bøkur, tey hava lisið*

# Ljóðbøkur til hvønn ein tørv

**Gongur tú ein kaitúr, fert tú út at rógva, ella røktar tú seyð úti í haganum, ja so er tað ikki longur nøkur forðing fyri at halda teg dagførdan við nýggjastu krimisøgunum hjá Lizu Marklund ella Jan Guillou. Einasta ið krevst er, at tú minnist til at taka fartelefon ella MP3-avspælaran við, tá ið tú fert heimanífrá**

Í Svøríki eru ljóðbøkur nú so væl umtóktar, at tað er vorðið næstan líka vanligt at spyrja fólk, um tey hava hoyrt eina bók sum um tey hava lisið hana. Hetta sæst eisini aftur í útboðnum av ljóðbókum, sum bæði er breitt í innihaldi og fjøltáttað í formi.

Á bókamessuni Bok & bibliotek varð nýggjasta slagið av ljóðbókum sýnt fram, og tað eru bøkur, lisnar inn á minniskort til eitt nú fartelefonir. Bøkurnar fáast í ymsum sløgum av minniskortum, alt eftir, um tín fartelefon eitur Sony Eriksson, Nokia ella okkurt annað.

Minniskortið rúmar 1GB, so ivasamt er, um Ó-, søgur um djevulskap hevði rúmast á einum korti, men tað er ongin trupulleiki, tí tú kanst flyta ljóðbókina av kortinum yvir á teldu tína, MP3-avspælaran ella telefonina, og síðan fylla á aftur við nýggjum tilfari og annars brúka minniskortið sum eitt heilt vanligt minniskort.




*Ljóðbøkur á minniskortum til fartelefonir er nakað av tí nýggjasta nýggja, sum stóra svenska forlagið Bonnier bjóðar lesarum sínum – ella lurtarum sínum, átti ein heldur at sagt*

Sosialurin